Skjal (14)

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Almannamálaráðið

Dagfesting: 14.09.2018
Mál: 18/00684-15
Tygara skriv: dagfest 05.07.2018
Viðgjørt: JND

**Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**

Almannamálaráðið hevur við telduposti dagfestur 6. august 2018 sent Heilsu- og innlendismálaráðnum fimm løgtingslógaruppskot til hoyringar. Talan er um fylgjandi uppskot:

- Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin)
- Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. (Markamót)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum (Heimildargrundarlagið broytt frá 'forsorgarlóg' til 'vælferðarlóg')

Freistin at gera viðmerkingar til uppskotini, var sett til 14. september 2018.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur fylgjandi viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin):

1. Mælt verður til at nýta annað fólksligt heiti til løgtingslógina enn 'Vælferðarlógin'. 'Vælferð' er annað og meira enn veitingar, latnar við heimild í hesi lóggávu, sum t.d. veitingar á heilsu- og útbúgvingarøkinum.
2. Til § 24, stk. 1, nr. 2 og stk. 2: Gjørt verður vart við, at ásetingin ikki eigur at ávirka rættindi og skyldur borgarans ella viðgerarans jb. løgtingslóg um Heilsutrygd.
3. Til § 29: Mælt verður til, at hjálparráð til varandi tørv bert verða umsitin av einum myndugleika. Sum er, umsitur Heilsutrygd í ávísum førum stuðul til hjálparráð til varandi tørv. Heilsu- og innlendismálaráðið mælir til at skipa soleiðis fyri, at Almannaverkið burturav umsitur hjálparráð til varandi tørv.
4. Til § 30: Mælt verður til at nágreina, at ásetingin eisini fevnir um Cocklear Implant.
5. Til § 37: Mælt verður til at gera skilnað ímillum endur*menning* (da: rehabilitering) og endur*venjing* (da: genoptræning). Endur*menning* er eitt víðari hugtak, sum í einstaka førinum kann, men ikki nýtist, at fevna um endur*venjing*. Endur*venjing* hinvegin, er altíð (partur av) endur*menning*. Í sjúkrahúsverkslógini verður hugtakið endur*venjing* nýtt í

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

týdninginum fysisk, neurologisk ella kognitiv endurvenjing. Mælt verður til í vælferðarlógini heldur at nýta hugtakið endur*menning*, uttan tá týdningurin er neyvt tann sami, sum í sjúkrahúsverkslógini.

6. Til § 37, stk. 2: Undrast verður á niðara aldursmarkið á 16 ár, fyri at kunna fáa endurvenjing frá Almannaverkinum. Um meint verður við endurbúgving (da: revalidering) er aldursmarkið skilligt, men um talan er um endurvenjing, í týdninginum sum hugtakið hevur í sjúkrahúsverkslógini (sí pkt. 7 omanfyri), tykist ásetingin um aldursmark órímilig.
7. Til § 37, stk. 3: Greinin gevur landsstýrismanninum (í almannamálum) heimild til einvíst at áseta nærri reglur um "samstarv við sjúkrahúsverk". Heilsu- og innlendismálaráðið heldur, at henda kunngerðarheimildin antin má treytast av semju við landsstýrismannin í heilsumálum (sjúkrahúsmálum) ella skal samstarvið millum sjúkrahúsverk og almannaverk samskipast við løgtingslóg. Seinna loysnin merkir, at sjúkrahúsverkslógin og vælferðarlógin mugu samskipast á hesum økinum.
8. Til § 37, stk. 3: Mælt verður til at skrivað "og samstarv við sjúkrahúsverk, kommunur ella kommunal samstarvsøki" vísandi til, at Tórshavnar kommuna umsitur økið, sum sjálvstøðug kommuna.
9. Sambært § 37, stk. 1, nr. 2 og § 38, stk. 2, nr. 2 er annað av endamálunum við ávikavist endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing, at borgarin skal "klára seg uttan hjálp, ella við minni hjálp frá Almannaverkinum". Mælt verður til at broyta hesa orðing, soleiðis at endamálið verður at borgarin skal klára seg "uttan, ella við minni hjálp frá tí almenna" (herundir heilsuverkinum).

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin), uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. (Markamót), uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin) ella uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum (Heimildargrundarlagið broytt frá 'forsorgarlóg' til 'vælferðarlóg')

Vinaliga

Jan Simonsen
*deildarstjóri*